

## Bankapakki gevur vónir

Eitt endamál við bankapakkanum, sum teir donsku flokkarnir hava samtykt, er at geva bankunum møguleikar at veita smáum og meðalstórum handils- og vinnufyritøkum fígging. Henriette Steffensen, sum hevur eina lítla fyritøku, sigur við DR-kringvarpið, at bankapakkin hevur givið henni nýggja vón um framtíðina hjá fyritøkuni. Hon greiðir frá, at í seinastuni hevur bankin verið trekur við at veita kreditt, men at hetta vónandi broytist, ný bankin kann fáa meiri pening at ráða yvir.

# Lætt at vera stjóri í ringum tíðum



**Tað er ivaleyst eitt sindur av praktiskum muni á at vera leiðari í góðum tíðum í mun til ringum, men munurin er ikki so stórur. Tað heldur Andras Róin, sum varð valdur til Ársins Leiðara í 2007. –Tað er kanska ikki heilt rætt at siga, at tað er lættari at vera stjóri í ringum tíðum, men tað eru viðurskiftir, sum eru lættari at fáast við í ringum tíðum, í mun til í góðum. Millum annað er tað lættari at fáa starvsfólkini at standa saman - fáa tey til at skilja málini og síggja avbjóðingarnar, sigur hann**

**ÁRSINS LEIÐARADAGUR**
*Leif Láadal*

Fyri tveimum árum síðani var eingin ivi í, hvør ið skuldi verða valdur til Ársins Leiðara á Leiðaradegnum. Fleiri undraðust yvir, at viðkomandi ikki varð blivin valdur árið fyri, ella fyrsta árið, skipað varð fyri tiltakinum. Men nú bleiv tað so sum tað bleiv, og vinnarin í 2007 gjørdist væl umtókti og virdi stjórin á Føroya Tele, Andras Róin.

– Eg minnist væl, at tað var eitt sindur løgið at fáa hendan heiður, tí eg hevði júst avgjørt at fara frá sum stjóri hjá Føroya Tele, tá eg varð valdur, minnist Andras Róin.

Ein av grundgevingunum fyri at velja hann til Ársins Leiðari var, at Andras hevði torað at tikið ótradisjonellar avgerðir. Og hetta við tí ótradisjonella, er kanska vorðið eitt vørumerkið hjá Andrasi Róin. Í hvussu so er, so hevur hann framvegis sínar serstøku meiningar um bæði leiðslu, lívsvirðir og fíggjarkreppu, sum eru tey trý evnir, ið vit hava sett Andrasi stevnu at røða um.

### Lítil og eingin munur

Tað er ivaleyst eitt sindur av muni á at vera leiðari ella stjóri í góðum tíðum í mun til at vera tað í ringum, men munurin er ikki so ræðuliga stórur, sigur Andras Róin. Uppgávan er líka stór í báðum tíðum, tá tað snýr seg um at tryggja, at fakliga tilfeingi í fyritøkuni verður gagnnýtt, og tá tað snýr seg um trivna og onnur lívsvirðir í fyritøkuni, heldur Andras Róin.

– Tú kanst kanska lættari verða pressaður út í eina keðiliga støðu í ringum tíðum, til dømis í sambandi við uppsagnir, men avbjóðingin fyri ein leiðari eigur at vera líka stór í góðum, sum í torførum tíðum, sigur hann.

– Í ringum tíðum er tað lættari at forklára fólki, at tey mugu gera ein eyka innsats, og kanska ikki forlanga meira, fyrr enn virkið hevur avrikað meira, leggur hann afturat.

Andras Róin er ikki arbeiðsmasokistur, men hann dugir at virðismeta og liva við teimum sveiggjum, sum koma í arbeiðslívinum, og vandarnir í teimum góðu tíðunum koma ikki ordiliga til sjóndar, fyrr enn tær góðu tíðirnar eru av.

– Tað er t.d. vandi fyri at sovna, um tað gongur ov væl, tí tá er tað ikki líka lætt at motivera fólk, sigur hann og leggur afturat, at tá mann hevur nóg mikið av øllum, er tað kanska nøgdsemi, sum at enda manglar.

### Øðrvísi leiðari

Um eitt orð skal setast á leiðsluháttin hjá Andrasi Róin, er tað orðið "øðrvísi". Í hvussu so er, tá vit tosa um leiðslur í Føroyum. Aðrastaðni hava tey karismatiskar persónsmenskur, sum leiða fyritøkur á sín heilt serstaka hátt – stjórarnir í Hummel, Virgin og Apple kunnu nevnast – meðan vit í Føroyum og øðrum smáum samfeløgum mugu leita leingi eftir slíkum fólkum.

At seta Andras í bás saman við stjórunum í teimum trimum omanfyrinevndu fyritøkum, er kanska at taka í so rívan til, men Andras

**FAKTA**

**Grundgevingar fyri at velja Andras Róin Ársins Leiðari í 2007:**
Andras hevur framt miðvísa førleikamenning av starvsfólkumnum og skapað trivna. Hann hevur ment ein stirðnan almennan stovn til eina nútímans fyritøku. Hann hevur torað at tikið ótradisjonellar avgerðir.

**Andras Róin**

Føddur 15. desember 1961
Studentsprógv úr Hoydølum
Cand. Scient Pol. frá Århus Universitet í 1988.
Arbeiddi hjá Ikast Kommunu 1989 - 1990
Jydsk Telefon (seinni TDC) frá 1990 – 1995.
Arbeiddi í Bruxelles, Torino og Heildelberg; ein stóran part av tíðini hjá TDC við »Strategi og liberalisering«.
Ráðgevi frá oktober 1995 fyri Telefonverk Føroya Løgtings. Stjóri har 1. desember 1995 til 2007. 2007-08: Stjóri hjá Smyril Line.